**Erhard Joensen**
**Uni Holm Johannesen**
**Jacob Vestergaard**
**Annika Olsen**
**Bjarni Kárason Petersen**
**løgtingslimir**

Løgtingið

**Uppskot til samtyktar um at broyta veiðigjaldslógina**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið broytingar í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (veiðigjaldslógin), so veiðigjaldið verður ein stigvaksandi skipan, sum tekur hædd fyri støðuni og kvotanøgdini hjá einstøku rættindahavarunum.

**Viðmerkingar:**

Eitt yvirskipað atlit, sum bæði Løgtingið og umsitingarmyndugleikin altíð eiga at hava sær fyri eyga, er, at mest møguligt virði fæst burturúr føroyska fiskatilfeinginum.

Skiftandi samgongur hava kravt inn veiðigjøld frá fiskivinnuni, og tað hevur sum heild verið breið semja í politisku skipanini um, at hetta skal gerast.

Góðska og prísur fylgjast sum oftast, og myndugleikin eigur tí bæði at vera árvakin og umhugsin, tá ið skipanir, sum tann við veiðigjaldi, verða knæsettar, og somikið meira, tá ið talan er um eina skipan, ið regulerar so stór virðir, sum skipanin við veiðigjøldum ger.

Núverandi skipan leggur upp til, at allir aktørar, stórir sum smáir, verða vigaðir á somu vágskál, sum er miðalprísurin.

Ein aktørur við 5.000 tonsum kann ikki gagnnýta sítt skip eins skynsamt, sum ein aktørur við 50.000 tonsum, og kostnaðurin at veiða 1 kg er størri hjá smærru aktørunum enn hjá størru aktørunum.

Tá ið avreiðingarprísurin heldur enn avlop - umsetningur minus útreiðslur - verður brúktur sum vágskál, rinda smáir aktørar við smáum nøgdum lutvíst meira enn stórir aktørar við stórum nøgdum.

Fiskivinnan er ein avgerandi partur av tilverugrundarlagnum í Føroyum. Atlit mugu takast at, hvussu ein skipan við tilfeingisgjaldi skal skipast, so hon er til fyrimunar fyri alt tað føroyska samfelagið, og ikki bara einstakar føroyingar.

**Á Løgtingi, 18. desember 2025**

Erhard Joensen Uni Holm Johannesen Jacob Vestergaard

Annika Olsen Bjarni Kárason Petersen